

# The Simpsons

**Sera væl dámdi og undirhaldandi kult-teknifilmurin við tí gulu familjuni The Simpsons. Vit fylgja gerandisdegnum hjá Homer og hansara familju í lítla býnum Springfield, har altíð okkurt ørligt hendir.**

Hesin FOX-teknifilmurin hevur verið vístur á viasat kanalunum tv 3 og 3+ í fleiri ár. Hetta er ein heimskend teknifilmsrøð, har m.a. víðagitin tónleikanøvn hava gestað, t.d. Paul og Linda McCartney, Ringo Starr, James Brown, Tom Jones og fleiri enn. Mann kann síggja The Simpsons hvønn gerandisdag kl. 18.00 á 3+.
Men hvør stendir aftanfyri søguna um ta gulu familjuna og hvørjir eru persónarnir í The Simpsons? Her er eitt sindur um hesa merkverdigu gulu familjuna.

**Framleiðararnir**
Teir tríggir Matt Groening, James L. Brooks og Al Jean hava skrivað, tekna og framleitt The Simpsons. Hesi nøvn ganga aftur í undirhaldsheiminum. Matt Groening er tann sum skapti hesa ævigu kjarnufamiljuna og fekk hana á skíggjan í 1987. James L. Brooks hevur arbeitt við stórfilmum, sum t.d."Jerry Maguire" og "As good as it gets." Al Jean byrjaði at arbeiða við The Simpsons, í 1989, tá sendingin bleiv til eina fasta raðsending. Hesin Harward studenturin hevur fingið kredit fyri meiri enn 200 av pørtunum. Og í løtuni er hann høvuðsskrivarin. Hann er eisini kendur frá skemtisendiróðini Alf, sum gekk á Svf.

**Familjan Simpson**
Familjuhøvdið Homer er ein víður persónur bæði so og so. Nógvir eru leiklutirnir, sum hann fyllir: giftur maður, pápi, trygdar og eftirlitsmaður á kjarnorkuverkinum í Springfield, bovlari, øl drekkari, astronautur, vinnurekandi og droymari. Á ein hátt sær alt so nemt og líka til út hjá Homer. Men uppvøksturin var als ikki altíð so nemmur. Pápin Abe, royndi, sum best bar til, at fylla staðið, sum tann villa og fráverandi hippi mamman var farin frá. Men saman við Marge Simpson slóg Homer seg niður í Evergreen Terrace, ein hægri miðstættar býlingur í Springfield. Honum dámar annars væl Duff øl, donuts, fleskasteikina hjá Marge og at hyggja eftir bi-manninum á sponsku rásini. Honum dámar ikki stjóran Mr. Burns, havaarbeiðið og grannan Ned Flanders.

Konan Marge er ein lukkulig heimagangandi mamma at trimum, hennara egnasteinum, Bart, Lisa og Maggie. Hon er eisini sera errin av sínum manni, sjálvt um hann í heilum missir lyklarnar burtur og vil hava hana at finna teir. Burtursæð frá hennara heimligu skyldum, so hevur hon tó gingið úti á eggjini. Hon hevur nemliga, heilt stutt, flirtra við einum bovlara og var einaferð nær við at verða forførd inn í ólógligt virksemi av einum granna.

Bart er buldribassin, sum ikki tímir væl í skúlanum og dámar væl at hyggja í sjónvarp. Tó, longu sum 10 ára gamal, hevur hann avrikað eina rúgvu. M.a. hann hevur havt egna sjónvarpssendingar, við Krusty The Clown sum gesti, eisini uppdagaði hann eina halastjørnu, sum nærum gjørdi av við Springfield og hann var líka við at fáa leiklutin í filminum Radioactive Man.

Lisa klárar ikki at bíða inntil hon sleppur í studentaskúla. Hon er bara 8 ár, men lesur, sum um hon er 18 ár. Hon elskar at ganga í skúla og spæla saksofon. Hon er vegetar og um tað var eitt, ið hon hevði kunna fingið, so var tað, burtursæð frá heimsfriði, eitt ross.

Maggie hevur gjørt eina rúgvu. Hon er bara eitt ár og longu hevur hon reikað runt umkring í Springfield og eisini skjeyt ríkasta borgaran, tí hesin royndi at stjala hennara slikkipinn. Hon ynskir, at hon einaferð kann læra at tosa og at ganga uttan at detta.

The Simpsons bleiv herfyri innstillað sum eitt virðislønarevni í Emmy Awardss 2003, undir bólkinum "Outstanding Animated Program" og "Outstanding music and lyrics".

**Røddir**

**Dan Castellaneta:** Homer, the Krusty the Clown, Mayor Quimby
**Julie Kavner:** Marge, Patty og Selma Bouvier
**Hank Azaria:** Barvørðurin Moe Szyslak, Kwik-E-Mart eigarin Apu Nahasapeemapetilon, løgregluovastin Wiggum og Comic Book Guy.
**Harry Shearer:** Kjarnorkuverksstjórin Mr. Burns, grannin Ned Flanders, skúlastjórin Seymour Skinner, Reveren Lovejoy og busførarin Otto.
**Nancy Cartwright:** Bart og vinmenn hansara Ralph Wiggum, Nelson Muntz, og Todd Flanders.
**Yeardley Smith:** Lisa Simpson.









VARPIÐ